## DAGSINS MEINING

# Fólkafloks-uppíblandan

Framferðin hjá Bjarna Djurholm í málinum viðvíkjandi Framtaksgrunninum vekir einki álit hvørki í Føroyum ella uttanlands. Politisk uppíblanding beint uppundir val er av tí illa, serliga tá tað m.a. snýr seg um Føroya stórstu útflutningsfyritøku.

Nú er tað ikki rætt bert at lasta Bjarna Djurholm fyri hesa skeivu mannagongd. Bjarni Djurholm umboðar ein flokk og ikki minst eina samgongu. Er tað so, at Bjarni Djurholm hevur tikið avgerðirnar viðvíkjandi Framtkasgrunninum púra einsamallur, ella kann tað hugsast, at leiðslan í Fólkaflokkinum hevur tikið hesa avgerð? Um so er, so vita vit, hvat klokkan er sligin. Hava samgongufelagarnir einka at skulla sagt í hesum máli?

Tey flestu eru í hvussu so er samd um, at tað er óheppið, at ein landstýrismaður skal velja nevndina í Framtaksgrunninum hvørt ár. Hetta varð innført av m.a. Fólkaflokkinum, ið var sera atfinningarsamur móti Sverra Hansen fyrrverandi formanni í Framtaksgrunninum, men ikki sluppu teir eftir honum, tí hann var valdur í eitt áramál.

Hvat liggur aftanfyri undarligu atferðina hjá Fólkaflokkinum nú beint uppundir val? Vilja teir sleppa framat fatinum aftur? Fólkaflokkurin var altíð ímóti Fiskavirking – væl at merkja aftaná, at landið hevði verið við til at sanera virkini, sum nú er Fiskavirking.

Føroyska fiskivinnan er vorðin ríkari av Fiskavirking loysnini, men tann vardi verkstaðurin hon plagdi at vera, og tann varda skipanin, vit hava í fiskiflotanum ger, at menn kunnu fella aftur í gamlar óvanar.

Tað kann ikki verða so týdningarmikið fyri raksturin av einum virki, hvør partaeigarin er. Sum nú er eigur Framtaksgrunnurin og harvið skattgjaldarin Fiskavirking, og virkið er væl rikið. Tað má ikki henda, at alt verður brotið niður aftur, sum er bygt upp, tí menn vilja petta alt sundur aftur og innføra ein vardan verkstað. Hava menn hug at stovna flakavirki, so lat teir uttan landskassans hjálp – tað stendur einum og hvørjum frítt í dag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ingeborg svarar Høgna

Svar til skriv hjá Heina Holm, valevni hjá Tjóðveldisflokkinum, í Sosialinum dagfest 6. apríl og 9. apríl 2002

Í skrivinum nevnir Heini Holm fýra fakfelagsformenn við navni og kallar tey leigisveinar hjá Javnaðarflokkinum.

Ingeborg Winther,
Gunnleivur Dalsgarð,
Carita Bjørklund og
Elsa Birgitta P. Petersen

Heini Holm hevur misskilt hvørja uppgávu eitt fakfelag hevur. Arbeiði hjá einum fakfelagsformanni er at standa í fremstu røð og arbeiða við teimum málum á arbeiðsmarknaðinum, sum til eina og hvørja tíð eru uppi í tíðini. Fakfelagsformenn skulu arbeiða fyri sínar limir og verja teirra áhugamál, líka mikið hvørjir flokkar stýra landinum.

Politikararnir hava eisini sítt at forsvara, men teir mugu gera sær greitt og tola, at teir koma at standa mitt í stríðnum. Tað gera teir oftast eisini.

Tað er ikki persónarnir, men málið, viðgerðina og niðurstøðuna hjá politikarunum, tað snýr seg um fyri fakfeløgini.

Ingeborg, Gunnleivur, Carita, Elsa Birgitta og Óli Holm eru persónar, sum eru uppi í tíðini, men tað eru ikki nøvnini, man skal fokusera uppá, men sakina.

Tað er okkara arbeiði at taka lut, gera vart við okkum og fyrst og fremst at verja okkara limir og teirra arbeiðs- og lønarviðurskiftir. Um fakfelagsformenn ikki gera tað, gera teir ikki sítt arbeiði til lítar.

Tað er eyðsæð, at Heini Holm ikki veit, hvat hann tosar um. Tað átti hann at gjørt, áðrenn hann úttalar seg.

Orðið "leigisveinar" er eitt sterkt og negativt løtt orð, og vit halda ikki, at vit fakfelagsformenn í Føroyum eiga at fáa slík orð fest á seg.

Undirritaðu krevja, at vit verða hildin uttanfyri partapolitiskt kjak.

# Fólkið fyrst

**Sverre Midjord**
*valevni fyri Javnarflokkinum*



Javnaðarflokkurin hevur lagt sína valskrá fam, og hevur har boðað frá, hvat okkara flokkur fer at seta fremst í samgongusamráðingum, og sum vit fara at fremja um vit fáa veljarans álit.

Okkara flokkur setur trygdina hjá fólkinum fremst, vit fara at skapa tað meira liviligt, soleiðis at tey, sum í dag eru á niðastu rók á mangar mátar, veruliga fjálga um, so tey eisini fáa nakað av samfelagságóðanum.

Her hevur flokkur okkara sett sær fyri at nøkta tørvin av ellis og røktarheimun, bæði fyri eldri og fyri tey sum hava meira røkt fyri neyðuni. Tey, sum eru hjálparleys, skulu ikki føla, at tey eru til ampa.

Hetta er eitt mál, sum verður sett framaliga í samgongu samráðingum. Vit fara at fremja hetta, tey sum eru gomul og veik, sum hava tænt okkara samfelag, sum hava gjørt sínar skyldur, teimum hevur samfelagið nú skyldur yvirfyri, so tey kunnu fáa eitt blítt og ríkt lívskvøld.

Trygg lívskvøld skal tryggjast okkara eldri.

Tvøroyrar Býráð ger nú fyrireikingar til byggjan av sambýli á ogn býráðsins í Trongisvági. Hetta er eitt mál, sum var byrja í fyrra býráðnum, og nú verða tekningar og aðrar fyrireikingar gjørdar, so at vit, um ikki so langa tíð, kunnu bjóða okkara eldri trygg og góð viðurskifti.

Tað hava tey uppiborið.

# Størri frælsi innan Ríkisfelagsskapin

**Bent J. Hansen**
*valevni fyri Sambandsflokki í Suðurstreym*



Samgongunar hugsan og serstakliga Tjóðveldisfloksins tvíhaldan um, at loysingin gevur okkum størri frælsi, heldur ikki

Vit kunnu staðfesta:

- at Føroyar og føroyingar hava rætt at taka seg úr verandi ríkisstøðu
- at Føroyar og føroyingar hava hinvegin eisini rætt at varðveita verandi støðu ella skipa eitt nýtt og betri samríki við Danmark
- at Føroyar og føroyingar kunnu ikki lógliga missa sjálvsavgerðarrættin, mál, mentan og innlendis stjórnarskipan í einum samríki
- at føroyingar mugu allir standa saman um at verja sjálvsavgerðarrættin og virða okkara felags støðu
- at onnur lond, ið hava fullveldi, hava ofta minni sjálvræði eftir enn Føroyar hava. Til dømis Danmark við ES-limaskapi og Norra við EØS-samstarvinum hava latið fleiri málsøki frá sær enn Føroyar hava
- at fullveldi í sær sjálvum gevur bert formligar heimildir til politisku skipanina. Men verða hesar heimildir ikki brúktar at økja um persónliga frælsi og demokratiið, og verður neyðugt at lata frá sær sjálvræði sambært altjóða sáttmálum, ja so vil fullveldi merkja minni frælsi enn samríki
- at fullveldi fer at geva okkum færri rættindi og valmøguleikar, og harvið minni persónligt frælsi.

Sambandsflokkurin kennur seg tískild sannførdan um, at ein samríkisskipan við greiðum valdsbýti og við flestu málsøkjum antin á føroyskum hondum ella skipaðum eftir føroyskum ynskjum, er tann skipan, sum tænir Føroyum og føroyingum best.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Fólkið skal ráða í ríkismálinum

**Elin Lindenskov**
*Valevni Javnaðarflokksins*



Einki er komið burtur úr hjá sitandi samgongu seinastu fýra árini. Innanlands hava stórir trupulleikar staðið óviðgjørdir, og í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark er einki hent, uttan tað, at teir hava minkað blokkin við 360 milliónum.

Hví? Jú, tí samgongan bara hevur arbeitt við fullveldismálinum. Tað var einasta málið, sum hevði týdning fyri samgonguna. Teir hava barst sum óðir við danir fyri fullveldi, og einasta málið var konfrontatión og útliman úr ríkinum. Viðurskiftini við danir hava ongantíð verið so ring sum nú. Føroyingar hava staðið ræðsluslignir og hugt at, meðan samgongan hevur handlað klárt í móti fólksins vilja. Allar veljarakanningar hava víst, at føroyingar ikki tóku undir við fullveldisætlanunum.

Teir vildu avgjørdir hava alt – og fingu tí einki. Ørðvísi hevði verið, um Javnaðarflokkurin hevði verið í samgongu. Tí so høvdu vit fingið eina loysn, har sjálvstýrislógin var grundarlagið. Ein loysn, sum gongur fólksins vilja á møti, ein loysn innan fyri ríkisfelagsskapin, og ein loysn har føroyingar sjálvir so við og við kunnu avgera, hvørji mál skulu yvirtakast.

Tað gevur onga meining at seta eina 12 ára ætlan upp, har vit framman undan siga, at ætlanin skal føra til fullveldi. Hetta er at taka ræðið frá teimum, sum skulu manna tingið um 12 ár.

Javnaðarflokkurin meinar, at vit skulu hava greið viðurskifti við Danmark og at vit skulu seta sjálvstýrislógina í gildi. Hetta gevur einum og hvørjum løgtingi í framtíðini sjálvum møguleika til at ráða yvir, hvørji mál skulu yvirtakast – og um fólkaatkvøða skal verða um fullveldi ella ikki. Tí fólkaatkvøða skal sjálvandi verða um eitt slíkt stórmál. Tá skal føroyska fólkið sjálvt tala. Tí fólki veit best sjálvt, hvat tað vil.

Vilt tú hava eina góða loysn á ríkismálinum, so vel Javnaðarflokkin. Og minst til at seta kross við eina kvinnu. Vel lista C.
www.lindenskov.com

# Hugleiðing um frælsi

**Sigfríður Dam Olsen,**
*valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Eins og fuglurin føniks tykist loysingarørslan at vakna upp úr dvala í ávísum tíðarbilum. Mótvegis teim 500 árunum hjá føniks, so er loysingarørslan nøgd við umleið 50 ár : 1906 – 1948 og 1998. Buldur og brak !! Men sum Tróndur gamli á sinni, hann suffaði við, so aftur í song - aftur at hvíla. Hvussu verður so „Hesuferð" ??

Nýggja ættarliðið í Tjóveldisflokkinum hevur gjørt upp við fortíðina. Tey hava brent brýr !! Tey, ið nú mynda flokkin, eru yvirfrelst fullveldisfólk, og tey vilja ikki kennast við tann ótrúliga framburð, sum teirra egni flokkur, saman við øðrum, hevur verið við til at skapa síðan 1948. Tað er eisini eydnast teimum at beina tey „eldru, hóvligu og semjusøkjandi brekini" av vegnum, og samstundis fækka streingirnir á ljóðførinum, og í skrivandi stund tykist bert ein einasti strongur at vera eftir : Fullveldisstrongurin. Tveir hava tey havt at leika á seinastu fýra árini, men varni búskaparstrongurin slitnaði tann minniliga, seinasta dagin í tinginum, tá løgtingsformaðurin citeraði Fleksnes : „Skal det være fest, da la det være fest".

Í fullveldisrúsi himprast tey ikki við at misbrúka tað vakrasta orði í máli okkara, orðið FRÆLSI ! Í hugaheimi tjóðveldisfólksins merkir frælsi rætt og slætt : loysing. Og tá tey citera og syngja: „Í hjørtum okkara býr frælsi, so meina tey við": Í hjørtum okkara býr loysing.

Hjá okkum í Javnaðarflokkinum merkir orðið frælsi so nógv annað og so nógv meiri enn loysing. Fyri okkum merkir frælsi : frælsi til at kunna velja samband, frælsi til at kunna velja loysing, frælsi til at velja eina skipan, sum føroyingar flest kunna semjast um, ja frælsi til yvirhøvur at kunna velja. Og ikki minst frælsi at tala, skriva og trúgva !!

Vit í Javnaðarflokkinum taka okkum eisini tað frælsið at syngja : „Í hjørtum okkara býr frælsi", og tað bylgist innan í okkum, og vit syngja av hjarta. Og vit kunna væl sagtans syngja sangin saman við Tjóðveldisflokkinum, hóast vit tolka orðini øðrvísi. Eisini taka vit okkum tað frælsi at syngja : Hóast rákið er til høgru, eru hjørtuni…… Halló, hvar fóru tit ???:

# Nógv er fingið av skafti, og mangt er út í kortið sett!

**Rúni Nielsen,**
*valevni Tjóðveldisfloksins, Trongisvágur*

Andstøðuflokkarnir føra ferð eftir ferð fram, at einki er hent í Suðuroynni farna valskeiðið. Men so er ikki. Fullveldissamgongan, ið bert hevur sitið fýra ár, hevur tvørtur ímóti teknað Suðuroynna á Føroyakortið aftur.

Hundratals milliónir eru settar av til íløgur. Nýggjur Smyril er júst sáttmálafestur í sólríku Spaniu. Tunnlagerðin millum Øravík og Hov bíðar bara eftir startskotinum. Lastbilar standa klárir at føra grótið frá tunnilsgerðini til nýggju ferjuleguna á Drelnesi.

Nýggj ferjulega er stungin út í kortið í Vági. Handverkarir standa fúsir at byrja uppá nýggja miðnámsdepilin í Suðuroy. Heilsuskúlin í Suðuroy er dag um dag karmur um frálæru innan heilsurøkt. Og hetta bert fyri at nevna eitt sindur av tí sum er hent ella raðfest seinastu fýra árini. Hetta við at raðfesta er skynsamur fíggjarpolitikkur.

Tí ljóðar tað løgið og órættvíst tá sagt verður, at onki er hent og at ongar ætlanir eru við Suðuroynni. At Suðuroyggin hevur verið afturúrsigld er rætt, men so er at spyrja hvørjir flokkar hava havt buktina og báðar endar í fleiri tíggjuáraskeið. Tað hava verið ríkiligir møguleikar at gjørt gott fyri oynna alla hesa tíð, men ikki fyrr enn nú, fullveldissamgongan, undir leiðslu Tjóðveldisflokksins hevur rátt fyri borgum, er farið at bragda.

Hetta eigur tú at hugsa um hin 30. apríl. les meira á www.ut.fo

# Pensiónsspurningurin má loysast í komandi valskeiði

**Andrias Petersen, valevni**
*Javnaðarfloksins í Eysturoy*



Javnaðarflokkurin fer til val uppá at skapa eina pensiónsskipan sum røkkur langt inn í júst byrjaðu øld. Vit hugsa okkum eina pensiónsskipan sum er býtt upp í trý.

1. Fólkapensión á fíggjarlógini.
2. Samhaldsfasta arbeiðsmarknaðarpensión.
3. Privata pensión fyri tey sum vilja hetta.

Sjálvandi skal ein partur av pensiónini vera á fíggjarlógini, soleiðis at tey sum eru arbeiðsfør lata skatt til landskassan, sum so letur pensión útaftur til tey sum hava lagt frá sær aftaná eitt langt arbeiðslív ella hava mist arbeiðsførleikan. Hetta er samhaldsfesti og samstundis flytan av pengum frá teimum sum hava fullan vinnuførleika og møguleika fyri góðari inntøku til tey sum hava lagt frá sær ella hava mist arbeiðsførleikan.

Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðargrunnurin er í løtuni fíggjaður við 0,5% av hvørjari tjentari krónu av arbeiðstakaranum og 0,5% av útgoldnari løn frá arbeiðsgevarinum. Hetta gevur í løtuni 700 kr. um mánaðin í útgoldnari pensión. Tað er møguleiki at økja henda procentpart til 2,5%, samstundis sum gjaldið til ALS, sum nú er vælkonsolidera, verður lækka. T.v.s at Samhaldsfasti uttan hóvastak kann koma upp á 3500 kr. um mánaðin - og nú byrjar at líkjast!

Tað skal framvegis verða møguleiki hjá fakfeløgum ella einstaklingum at tekna privatpensiónir, sum vera uppspardar í pensiónsgrunni, ella sambart avtalu við tryggingarfeløg ella peningastovnar. Henda seinasta skipan tekur ár at uppbyggja. Vanliga verður rokna við 25 til 30 ár áðrenn slík skipan virkar til fulnar.

Fyrimunirnir við tilíkari pensiónsskipan er, at tú fært tvær samhaldsfastar skipanir, har tú flytur pengar frá teimum sum tjena nógv til tey sum tjena minni, og soleiðis tryggjar ein meira líkan aldurdóm. Tann privata skipanin ger tað møguligt hjá teimum sum vilja og hava ráð, at leggja nakað afturat tí vanligu pensióníni.

Treytin fyri at slík skipan kann vera haldgóð ártíggir frammyvir er at stórur partur av politisku skipanini tekur undir við henni t.v.s minst tríggir av teimum stóru politisku flokkunum og at meginparturin av fakfeløgunum tekur undir við henni. Sum tey politisku signalini hava verið seinastu tíðina eigur hetta at verða møguligt komandi valskeið.